Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bjørt Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Teknmálsorðabókin – fullføra orðabókina og møguleikar at menna føroyska teknmálið

Spurningar:

1. Ætlar landsstýrismaðurin at tryggja, at teknmálsorðabókin kann fullførast og víðarimennast?
2. Hvussu nógv metir landsstýrismaðurin, at tað kostar at fáa gjørt teknmálsorðabókina lidna, so hon í dygd og vavi kann sammetast við móðurmálsorðabøkur?
3. Hvussu stór er almenna játtanin til hetta arbeiði?
4. Hvussu metir landsstýrismaðurin, tað gongur at "... røkja, menna og verja føroyska teknmálið", soleiðis, sum lógin um Málráð ásetir?
5. Eru stig, sum landsstýrismaðurin ætlar at taka, fyri at tryggja varðveitslu og víðari menning av føroyska teknmálinum og atkomuligheit til málið í almenna rúminum. Um ja, hvørji?

Viðmerkingar:
Føroyska teknmálið varð í 2017 góðkent, og í lógini um Málráð er ásett, at: "Málráðið skal harumframt serskilt røkja, menna og verja føroyska teknmálið." Væl mentar orðabøkur eru ein grundarsteinur undir at varðveita og víðarimenna eitthvørt mál. Ein teknmálsorðabók finst á fo.signwiki.org. Henda orðabók er tó langt ífrá liðug.

Tað er trupult at menna eitt mál, um neyðugu amboðini ikki eru tøk og orkan avmarkað. Skulu vit hava eina nøktandi teknmálsorðabók krevst játtan, og at onkur verður settur at gera arbeiðið.

Ein væl útbygd orðabók er eitt av fleiri neyðugum átøkum fyri at gera teknmál munandi meira atkomuligt og møguligt at brúka allastaðni í samfelagnum. Og fyri at geva fólki lætta atgongd til at læra føroyskt teknmál.

Í føroysku teknmálsorðabókini eru umleið 1.400 tekn, men skal orðabókin avspegla teknmálið eiga tað at vera fleiri túsund. Til samanbering kann nevnast, at í íslendsku teknmálsorðabókini eru nú savnaði nærum 12.000 tekn.

Á Løgtingi 21. juni 2022

Bjørt Samuelsen